

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 04 - 2013

# Nýtt Statoil-fund í Norðsjónum

Hóast tað skjótt eru 50 ár síðani, at fyrstu oljukeldurnar vórðu funnar í Norðsjónum, so verða framhaldandi nýggjar keldur funnar sohvørt borað verður ikki minst í longu kendum oljuøkjum. So var eisini nú um dagarnar, tá Statoil og almenna oljufelagið Petoro komu fram á stórar nøgdir av olju nærhendis Gullfaks oljukelduni. Mett verður at framleiðslan frá hesum nýggja feltinum kann byrja rættiliga skjótt. Talan er um sera góða oljugóðsku. Góða boriúrslitið er partur av royndunum hjá Statoil at fara inn í verandi loyvi og oljuøki í Norðsjónum við nýggjum eygum. Sama varð galdandi, tá risastóra oljukeldan Johan Sverdrup varð funnin nøkur ár herfyri. Øystein Michelsen, varaforseti fyri menning og framleiðslu hjá Statoil í Norra er sera nøgdur við úrslitið av hesi boringini, sum hann metir neyvan verður tann seinasta heldur av hesum slagnum. Fyrstu metingarnar av støddini á kelduni vísa, at hon goymir millum 40 og 150 mió. tunnur av olju.